# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sigur fyri Føroyar og tolsemið

Føroya Løgting samtykti fyrrapartin søguliga lógarbroyting. Ein meiriluti av tingmanningini tók undir við uppskoti um at víðka grein 266 B í revsilógini til eisini at umfata seksuella orientering. Hetta er sum tingformaðurin sigur við Sosialin í dag - ein sigur fyri Føroyar og fyri tolsemið.

Tað eru fá mál í føroyskum politikki, ið hava fingið so nógva umrøðu, og sjáldan hava so mong brúkt sín demokratiska rætt at siga sína hugsan. Og frá báðum síðum tvs. teimum, sum hava verið fyri at verja tey samkyndu í revsilógini, og teimum, sum hava verið ímóti. Málið hevur eisini vakt miklan ans í okkara grannalondum, hartað hevur verið funnist at royndunum hjá føroyskum politikarum at forða lógaruppskotinum, ið skal geva samskyndum rættarverju, verða hesi hartað ella niðurgjørd vegna sína seksuellu orientering.

Málið hevur verið fyri á tingi áður, og tá fall tað. Eftir eina hending í Havn, har samkyndur maður varð álopin, varð málið tikið uppaftur, og tingfólkini Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmørk, settu fram nýtt uppskot til verju av teimum samkyndu. Orðaskiftið í kjalarvørrinum á hesi avgerð hevur verið sum at rætta hundi brand.

Nógv hevur verið gitt, hvussu fór at ganga við hesum sera turbulenta máli. Flestu tekin hava verið til, at tað fór at fella. Men so bleiv ikki. Málið varð samtykt, tí nakrir tingmenn tóku upplýsing og atfinningar til sín. Hava víst seg sum sannar demokratar. Hetta mál er gott dømi um, tá fólkaræðið virkar.

Vit fegnast um, at hetta gjørdist endin á einum máli, sum var við til at seta kílar í føroysku tjóðina. Neisigararnir fara at vísa á, at samtyktin er ein myrkur dagur fyri Føroyar. Ja-sigararnir harafturímóti fara fegnast um, at fordómar og intoleransa hava fingið eitt alvorligt skot fyri bógvin. Givið er at henda avgerð fer at gagna Føroyum ikki bert her og nú men serstakliga uppá longri sikt. Eisini úteftir. Og so kann hon eisini vera við til - á øðrum økjum - at byggja brýr millum upplýsing og tolsemi. At fylla demokratisku karmarnar út. Vera við til at geva sannari humanismu betri fótafesti her á landi, uttan at hetta skal taka grundarlagið undan trúgvandi Føroyum.

Trúgvandi Føroyar hava nevniliga gott av, at tolsemisvindar úr umheiminum eisini røkka okkum og geva okkum gott í beinið. Fyri tað ber væl til at varðveita og ikki minst menna góða og sunna trúgv og mentan.

**Sosialurin**

## Sjúkraflutningstænastan í Sandoynni verður ikki misrøkt



**TUMMAS Í GARÐI**
læknastjóri

Í Dimmalætting dagfest 31. oktober 2006, og í fleiri greinum dagarnar aftaná verður Gerhard Lognberg lagdur undir at misrøkja sjúkraflutningstænastuna á Sandoynni. Hetta er ikki í samsvar við veruleikan.

Sjúkraflutningstænastan í Sandoynni kostar kr. 25.000 um mánaðin í starvsløn. Tveir ambulansumenn hava vakt samstundis og verður upphæddin deild til tvey vaktløg, sum hvørt fær kr. 12.500,- um mánaðin. Fyri hesa upphædd skulu ambulansufólkini verða á vakt 24 tímar um døgnið, og flyta sjúklingar á Landssjúkrahúsið á nátt sum á degi. Talan er soleiðis um eina skipan har sjúkraflutningurin verður røktur av fólki í parttíðarstarvi, sum noyðast at hava annað arbeiði afturat.

Gerhard Lognberg og hansara fólk hava ikki allarbestu umstøður at arbeiða undir: Ongin garasja er fingin til bilin og til at hava eykaútgerðina í.

Fyri at bøta um hendan trupulleikan er framyvir fingin ein skipan, har sjúkrabilurin úr Sandoynni verður umbýttur við ein klárgjørdan bil av Landssjúkrahúsinum, aftaná hvønn sjúkraflutning.

Hesi 13 árini Gerhard Lognberg hevur havt ábyrgdina av sjúklingaflutningin á Sandoynni, hevur samstarvið verið gott, og eingin klaga er komin til Landssjúkrahúsið um tænastuna. Gerhard Lognberg hevur sjálvur peikað á, at sjúkraflutningstænastan á Sandoynni kann dagførast og eisini á fundi á Landssjúkrahúsinum skotið upp aðra skipan.

Kommunulæknarnir á Sandi, eins og Sjúkraflutningstænastan á Landssjúkrahúsinum hava eisini ynski um eina skipan við sjúkraflutningstænastuni á Sandoynni, har starvsfólkini eru í fulltíðarstarvi, og regluliga eru inni á Landssjúkrahúsinum og arbeiða, bæði fyri at fáa starvsvenjing, og fyri at styrkja samstarvið. Ein tilík skipan við fólki í føstum fulltíðarstørvum, verður sera dýr í mun til lága túratalið í Sandoynni, men Landssjúkrahúsið er sinnað at arbeiða fyri at finna eina loysn.

Vit eru sera harmir um, at í greinini í Dimmalætting varð roynt at seta Gerhard Lognberg og teir sum røkja sjúkraflutningstænastuna í Sandoynni í eitt ringt ljós, heldur enn at peika á góðar framtíðarloysnir fyri sjúkraflutningstænastuna.

Teir sum røkja sjúkraflutningstænastuna á Sandoynni eru dugnaligir og nærlagdir, og gera sítt allarbesta, hóast korini sum teir hava at arbeiða undir, ikki eru serliga nøktandi.

Vit vóna at tað góða samstarvið við Landssjúkrahúsið kann halda áfram sum higartil, inntil ein nýggj skipan verður funnin.

## Jólini nærkast í hvørjum...



**DAN R. PETERSEN**

Nú jólini nærkast, hoyri eg, at onkur reiðari ætlar at lata síni skip fiska heilt fram til tollaksmessudag ella jólaaftan. Tey skulu síðani liggja við lastini til triðja dag, tá tey verða landaði og síðani aftur til fiskiskap triðja jólakvøld. 3-4 frídagar um høgtíðina. Fruktin skal kroystast til síðsta dropa.

Tað er um jóltíðir og nýggjárið at kenslurnar fyri familjuni eru sterkastar, tað er eisini hesar dagar, menn helst vilja vera saman við familjuni. Tað er nýggjársaftan, at børnini hava mest brúk fyri pápa sínum, einum stórabeiggja ella abba.

Seinnu árini er málið um frí alla høgtíðina reist av limum á fundi í F. F. Ítøkilig ynskir eru komin fram á fundi um at halda frí millum 18 desember og 3. januar. Eg havi ikki hoyrt, at hetta mál er reist yvir fyri reiðarafelagnum.

Tað er heilt klárt, at er hetta eitt ynski, sum er galdandi fyri meirilutan av limunum, og tað tykist tað at vera, so eigur tað at verða reist yvir fyri reiðarunum, og tað skal tað eisini blíva.

Ein slík skipan hevði verið góð fyri sjómannin, fyri familjuna og fyri grunnarnar.

Tolir pengapungurin hjá sjómansfamiljuni henda steðg, so tolir reiðarin hann eisini.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.